## Fiskalýsi sum brenni

Í Grønlandi er Piorsaavik, Maniitsoq Innovationshus Aps. farið undir at kanna, um tað ber til at nýta fiskalýsi sum brenniolju. Samstundis verður kannað, um tað ber til at frysta kóp og onnur súgdjór úr havinum og at brúka tey sum hundafóður á bygd. Ætlanin er at byggja smáar og einfaldar støðir, sum bygdarfólkini kunnu reka. Kanningarnar eru komnar so mikið langt, at eitt úrslit verður lagt fram á fundi um vikuskiftið.



*Grønlendingar umhugsa at brúka fiskalýsi til brenniolju*

*(Mynd: KNR)*

## Hugsa um prísin

Hóast fólkatalið í Týsklandi er tað størsta í Evropa, so er týski marknaðurin fyri fiskavørum ikki so stórur, sum fólkatalið kundi bent á. Tað sigur Peter Dill, stjóri í Deutsche See. Hann sigur, at nógvir fiskaútflytarar í øðrum londum hava eina skeiva uppfatan av týska marknaðinum. Sambært Peter Dill hyggur týski keyparin gjølla at prísinum, tá hann keypir mat, og hann vil heldur hava hálvlidna vøru enn lidnar rættir, sigur hann.

# Slutt við tollfríum tubbakki

**Í einari nýggjari kunngerð er ein nýggj §3 sett inn sum sigur: Sigarettir, sigarillos, sigarir og aðrar tubbaksvørur kunnu ikki flytast inn toll- og avgjaldsfrítt**

TOLLUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Karsten Hansen ætlar, at tað frá 1. juli í ár ikki longur skal verða loyvt at flyta inn sigarettir toll- og avgjaldsfrítt*

Nú skal ikki longur verða loyvt at flyta sigarettir inn tollfrítt. Tað verður staðfest í einari nýggjari kunngerð, sum Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri hevur gjørt.

- Avgjald á sigarettum er fyri í løgtinginum í løtuni, og eg haldi, at hetta er løtan at gera broytingina í tollfríari sølu av tubbaki. Hetta verður gjørt bæði av heilsuligum orsøkum og fyri at javnstilla fólk, sigur Karsten Hansen.

Hann vísir á, at tað eru fólk, sum ferðast ógvuliga nógv, og hesi fáa ein fyrimun mótvegis teimum, sum nærum ongantíð ferðast.

- Tá fólk velja at roykja, so eiga tey eisini at vera við til at gjalda fyri teir skaðar, sum royking elvir til. Og tað gera fólk ikki, um tey kunnu keypa tubbakið tollfrítt umborð á skipum ella flogførum, sigur Karsten Hansen.

Fíggjarmálaráðharrin slær fast, at tað er ikki fyri at útvega landskassanum nakrar eyka krónur, at hetta tiltakið verður sett í verk.

- Var tað fyri tær fáu krónurnar, sum landskassin helst fær í eyka intøku, so kundi tað verið gjørt á annan hátt, sigur Karsten Hansen.

Hann harmast um, at Smyril Line og Atlantsflog helsgt fara at missa inntøkur av hesi nýggju kunngerðini.

- Tað er tann keðiligi parturin í hesum málinum, men bæði Smyril Line og Atlantsflog hava ríkiligar møguleikar at kompensera fyri mistar inntøkur av tollfríari sølu av tubbaksvørum, sigur Karsten Hansen.

### Steinur oman á byrðu

Flutningsfeløgini eru alt annað en fegin um hesa kunngerðina. Bæði Andras Róin, stjóri á Smyril Line, og Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, fýlast á, at teir als ikki eru eftirspurdir, eins og teir eru samdir um, at skotbráið er alt ov stutt.

- Vit eru rættiliga skelkað av, at man bara setir eina slíka kunngerð í gildi, uttan at spyrja raktu partarnar, og uttan at hava nakra hoyringsfreist yvirhøvur, sigur Andras Róin, stjóriu á Smyril Line.

Hann vísir á, at orsøkin til, at man hevur hoyringsfreistir, er fyri at raktu partarnir kunnu tillaga seg til broyttu umstøðurnar.

- Tað er undarligt, at man velur at koyra smáttaríir gjøgnum løgtingið, meðan man orðnar stóru málini við einari kunngerð. Tað kann væl vera, at heimildirnar eru í lagi, men hetta er ein lítið gjøgnumhugsað broyting, sigur Andras Róin.

Eisini Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, er sera harmur um hesa broytingina í tollfríu søluni.

- Eitt er at hetta kemur so brádliga á, men við teimum trupulleikum sum flutningsfeløg framman undan hava, serliga tá hugsað verður um høgu oljuprísirnar, so verður hetta steinur oman á byrðu. Eg veit ikki, um hetta er ein roynd at forkoma ferðavinnuni, men tað rakar í hvussu er ógvuliga meint, sigur Magni Arge.

Hann vísir víðari á, at allar publikatiónir um Føroyar siga, at loyvt er at flyta inn 200 sigarettir tollfrítt, men við nýggju kunngerðini verða ferðafólk mest sum kriminaliserað.

- Samanbera vit við ES, so var har talan um heilt av avtaka tollfría sølu, og tað var ein tilgongd, sum vardi í fleiri ár, so ferðafeløgini fingu góða tíð at tillaga seg til nýggjar fortreytir. Her verður alt bara kroyst niður yvir okkum. Vit hava gjørt vart við okkum á røttum stað, og so kunnu vit bert vóna, at vit í minsta lagi fáa tíð at laga okkum til eina nýggja støðu, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog.

# Mentanin í hásæti í Sørvági

**Um vikuskiftið skipar Sørvágs kommuna fyri mentanarvikuskifti, har fleiri listaframsýningar eru á skránni í øllum fýra bygdunum í kommununi**

MENTANAR-VIKUSKIFTI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



Mentanin verður sett í hásæti um vikuskiftið, tá Sørvágs kommuna skipar fyri fyrsta, men ætlandi afturvendandi mentanarvikuskiftinum í kommununi.

Byrjað verður fríggjakvøldið, tá listaframsýning við Lassa Sørensen letur upp. Seinni um kvøldið, klokkan 20, verður kafékvøld við sangi og upplestri í fimleikahøllini í skúlanum. Tónleikarar verða Martin Joensen, Magnus á Stongum, Jóan Jakku Guttesen og Holgar Jacobsen. Eisini verður felagssangur, sum Remi Hansen og Jákup á Stongum skipa fyri. Jóan Pauli Joensen, Marna Joensen og Páll Weihe fara at hugleiða.

Stóri dagurin verður sum vera man leygardagurin. Byrjað verður klokkan 10 fyrrapart, tá Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri, fer at seta mentanarvikuskiftið. Havnar Hornorkestur og Sørvágs Tónleikarfelag spæla.

Tá verður eisini nýggja tiltakið »Ársins borgari« skotið í gongd. Eisini hetta er ætlað sum eitt afturvendandi tiltak.

Serligur dentur verður lagdur á listina. Listaframsýningar verða í øllum fýra bygdunum í kommununi við lokalum listafólkum. Hesar lata upp klokkan 11.

Í Sørvági er tað Lassi Sørensen sum sýnir fram í GarraríS, í Gásadali sýnir Poul Skarðenni fram í skúlanum, í Bø verður listaframsýning í Búri við Sigrid Ewald, Trónda Niclasen og Hervør Hergudóttir, og í Mykinesi verður listaframsýning í skúlanum við Kára Svensson.

### Fólkafundur

Seinni um dagin, frá klokkan 17 til 20, verður ein onnur listaframsýning við Zakaris Heinesen í Pakkhúsinum í Bø.

Eisini verður ein framsýning í húsunum við Gil av gomlum myndum og skjølum.

Um kvøldið verður kafékvøld í Missiónshúsinum, har Tórfríð og G.O.G, Tróndur í Bø og Hallur skipa fyri. Hetta tiltakið byrjar klokkan 19. Seinni um kvøldið, klokkan 21, verður hugnakvøld í Viðurbygri í Bø, har Katrina Petersen og Torfríð Tavsen fara at syngja, Sámal Ravnsfjall fer at syngja og spæla, felagssangur verður við harmoniku og Gullberg Gullfoss fer at hugleiða. Eisini verður matsøla við føroyskum viðskera.

Leygarkvøldið endar við dansi í Biohøllini við Tinganest.

Sunnudagin verður svimjihøllin alment opin frá 8 til 10 á morgni, og so verður gudstænasta klokkan 11.

Listaframsýningarnar í skúlanum í Mykinesi hjá Kára Svensson og í Pakkhúsinum í Bø við Zakaris Heinesen eru eisini opnar sunnudagin, og so verður ein gamal táttur tikin upp aftur. Tað verður nevniliga skipað fyri einum fólkafundi á Stakka, har Vilhelm Johannesen, fyrrverandi politikari, fer at flyta fram røðu.

Mentanarvikuskiftið endar við einari konsert í kirkjuni í Sørvági við næmingum úr Musikkskúlanum í Vágum.